# Lat okkum kvinnur sleppa sjálvdømandi óvananum



Eg hyggi runt í flokshølinum og royni at finna útav, um nakar annar vil siga nakað. Føli hjartað duka, og lógvarnir eru vátir: "Kom nú, fá so hasa hondina upp, og sig so, hvat tú hugsar," sigi eg innantanna við meg sjálva. Men nei, eg tori ikki, og lærarin fer víðari til næsta evni.

EFTIR: **RUTH WINTHER POULSEN,** MYNDIR: **PRIVAT OG SAVNSMYND**

Huff, hví hundan skal tað altíð enda soleiðis? Hví skal eg altíð fara heim úr skúla uttan at hava mælt eitt orð, meðan tómu tunnurnar sum vant hava rungað? Aftur henda dagin læt eg møguleikan fara framvið. Eftir í tímanum sat eg, sum hevði fyrireikað meg so væl, og tá vit vóru úti í smærri bólkum, var mítt evni nógv tað besta. Fyri at gera tað enn verri, so hevði eg gjøgnumgingið eina møguliga framløgu hart fyri sjeikinum kvøldið fyri. Men hóast alt hetta, fekk eg meg ikki at peika upp og leggja mítt fram fyri læraranum. Einasta forðingin var eg sjálv, sum endiliga skuldi gjøgnumganga mínar hugsjónir út í tað óendaliga, áðrenn tað kundi góðtakast til kjak.

Slíkar støður eru mangan komnar fyri í mínum ikki so ótrúliga langa lívi, og tær fara allarhelst at vísa seg aftur. Hetta at sita føst í egnum, fasthaldandi tonkum, sum ikki vilja lata meg slappa av og leypa út í tað. Ferð eftir ferð havi eg sitið við tí gylta essinum í hondini, men okkurt ger, at beint sum eg skal leggja kortið, so gerst kroppurin lamin, og eg verði ein passivur hyggjari.

Eg havi varhugan av, at hetta er eitt kvinnueyðkenni, og tað er heilt erligt ikki í lagi. Ungar sum gamlar mugu altíð spyrja einaferð eyka, um tað nú riggaði væl, sum tær gjørdu. Mugu altíð hyggja einaferð aftrat í speglið, og vilja altíð hava eina eyka vissu um, at tær ikki fara at standa til láturs.

## Besti vinur og ringasti fíggindi

Hetta býtta afturhaldni kemur ikki púrasta úr ongum. Vit kvinnur, eins og menn, hava tørv á stuðli, um vit vilja royna – ella flyta – mørk. Men stuðulin er ikki altíð sjálvsagdur. Orðatakið sigur, at eldur er tín besti vinur, men ringasti fíggindi. Nakað tað sama er sambandið millum okkum kvinnur.

Eg minnist einaferð, at eg sat í einum bussi og hoyrdi nakrar ungar gentur sita og tosa um eina gentu, helst vinkonu, sum ikki var hjástødd. Prátið var so grovt, at eg bleiv heilt illa við hennara vegna, og seinni sama dag segði eg einari vinkonu frá hendingini. "Kvinnur eru veruliga tað óndasta, sum finst," hvesti eg í øðini av tí, sum eg hevði lagt oyra til. Vinkona mín var partvíst samd, men helt eisini, at tær kunnu vera tað allarbesta, tá ið á stendur. Niðurstøðan okkara millum varð altso tann, at so fantastiskar, sum vit kunnu velja at vera, líka ræðuligar eru vit til tíðir.

Man tað vera júst hetta, møguleikin at verða útihýst av okkara egnu, sum ger, at vit kvinnur altíð eru so varnar, tá vit skulu skilja okkum burturúr? Um vit í staðin fyri at tosa ljótt um hvørja aðra vóru meira eggjandi, so høvdu fleiri allarhelst torað betur at markerað seg í gerandisdegnum.

## Amy Schumer

Hvussu er og ikki, so nógvir tankar og fløkjur, at ein undrast á, hví vit ikki langt síðani hava lagt henda (sjálv)dømandi óvanan av. Í ævisøgu sínari skrivar skemtarin Amy Schumer eitt brot um tað at gerast kvinna. Hon heldur ikki, at tað hongur saman við fyrsta mussi ella reyðum trussum. Heldur kendi hon seg fyrstu ferð sum eina kvinnu ta ferðina, hon stóð framman fyri einari synagogu í skellilátri, tí hon hevði sungið ein skeivan tóna. Men hon yvirlivdi.




Í bókini vísir hon á, at hóast vit kvinnur gera okkara allar ídnasta fyri at sleppa undan, so standa vit dagliga andlit til andlits við tað, sum vit óttast. Hvørt tað er at siga nei til ein lutaseðil ella at rópa hart í tímanum, men vit megna at basa tí.

Eg fari nokk ikki at skula syngja í nakrari synagogu í nærmastu framtíð, men eg eri tengd at skúlabeinki og framløgum í nøkur ár aftrat. Við Schumer í huga skal gerandisóttin niðurmanast, og vónandi havi eg megnað eina framløgu, tá henda klumman er prentað!

---

Ruth Winther Poulsen er uppvaksin í Hoyvík, men býr á Vesturbrúgv í Keypmannahavn. Hon lesur samskifti og journalistikk á Roskilde Universiteti. Forlovað við Djóna Abrahamsen. Mamma at 1 ára gamla Braga.